

*Høgni Zachariassen úr ÍF. h.m., er ein av teimum mongu nýggju, ungu monnunum, ið eru úttiknir til føroyska landsliðið í sambandi við venjingarleguna í Spania í næstum.*

*mynd: Álvur Haraldsen*

# Nógv nýggj nøvn í landsliðshópinum

**Føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen hevur úttikið 20 mans til venjingarleguna, sum verður í Spania seinni í hesum mánaðinum, og nógv nýggj andlit eru í hópinum**

LANDSLIÐSÚTTØKA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um góðar tvær vikur fer føroyska fótbóltslandsliðið á sína árligu venjingarlegu í La Manga í Spania. Um vikuskiftið vóru 30 mans savnaðir til venjing í Havn, og nú hevur Henrik Larsen so gjørt av, hvørjir teir 20 menninir eru, sum skulu við til Spania.

### Stuðulsleikarar sita heima

Verður hugt at hópinum sæst, at fleiri av vanligu stuðulsleikarunum á føroyska landsliðnum ikki eru við í hópinum, men at ein rúgva av yngri leikarum hava hinvegin fingið møguleikan.

Henrik Larsen sigur, at talan í veruleikanum er um eitt styrkt føroyskt U23-landslið, ið fer til Spania. - Eg havi gjørt av, at fleiri av teimum "gomlu" á landsliðnum sleppa at sita heima, tí vit vita, hvat teir standa fyri. Ístaðin hava vit boðsent fleiri leikarar, ið eru sonevndir "boblarar" til liðið, t.v.s. leikarar ið nærkast liðnum, sigur Henrik Larsen, ið heldur tað verða umráðandi, at ungir leikarar sleppa at "lukta" eitt sindur til landsliðið.

Eitt nú eru hvørki Jákup Mikkelsen ella Jens Martin Knudsen í hópinum, og í teirra stað eru teir báðir Bárður Johannesen úr HB og Tórður Thomsen úr NSÍ úttiknir. Til hetta sigur Henrik Larsen, at tað er eingin loyna, at bæði Jens Martin og Jákup eru komnir so mikið til aldurs, at teir neyvan verða á landsliðnum í so nógv ár afturat, og tí er umráðandi at lata aðrar sleppa framat á slíkum ferðum. Jens Martin Knudsen verður tó við á ferðini sum málmansvenjari hjá føroyska landsliðnum.

– Bárður hevur verið við áður, og Tórður er ein ungur og spennandi málverji. Vit hava eisini Gunnar Nielsen úr Frem í huga, men hann verður so ikki við á hesari venjingarleguni, sigur Henrik Larsen.

Eisini nevnir Henrik Larsen unga Jónas Þór Næss, sum júst hevur fingið yrkissáttmála í Frem sum ein leikara, ið teir heilt víst fara at hava eyguni eftir í framtíðini.

### Venjingarstøðið er nógv batnað

Sum áðurnevnt var ein bruttohópur upp á 30 mans savnaður til venjingar í Havn farna vikuskifti, og Henrik Larsen var væl nøgdur við venjingarstøði hjá øllum monnunum.

– Eg haldi, at tað vóru nógvir, ið stóðu seg væl farna vikuskifti, og eg má ásanna, at tað er vorðið alsamt truplari at velja út ein hóp, tí tað tykist sum um, at tað eru nógv fleiri leikarar at velja ímillum nú, sigur Henrik Larsen.

Føroyski landsliðsleikarin fegnast eisini um, at menn tykjast væl fyri so tíðliga upp á árið, og tað man óivað verða tí, at bæði feløg og leikarar eru vorðin meiri seriøs, heldur Henrik Larsen.

Somuleiðis er føroyski landsliðsvenjarin av teirri áskoðan, at tað er eitt stórt framstig fyri føroyskan fótbólt, at man nú hevur valt at longja kappingina, so at tað nú verða leikt 27 umfør ístaðin fyri 18, sum vanligt hevur verið seinnu árini.

– Spælarar í øðrum londum spæla ofta eitt stað millum 60 og 80 dystir árliga, og tað er sjálvsagt, at teir hava nógv betur dystarvenjing enn vit, so tað er bara gott fyri føroyska landsliðið, at kappingarárið verður longt, sigur Henrik Larsen.

### Bert ein venjingardystur á ferðini

Í mun til undanfarin, har tað altíð hava verið minst tveir venjingardystir á skránni, verður hesaferð bert tann eini dysturin leiktur á ferðini. Hann verður móti norska tippeligaliðnum HamKam, sum hevur navnframa Ståle Solbakken sum venjara.

– Vit meta, at tað er nóg mikið við einum venjingardysti, tí so fáa vit fleiri venjingar. Tá ið vit hava fleiri dystir á skránni, fáa vit tilsvarandi færri venjingar, og í ár hava vit so valt heldur at hava fleiri venjingar og so bert at spæla tann eina venjingardystin, sigur Henrik Larsen.

Føroyska ferðalagið fer til Spania leygardagin tann 19. februar, og komið verður aftur til Føroya sunnudagin tann 27. februar.

**Føroyski hópurin:**

**Málverjar:**
Bárður Johannesen, HB
Tórður Thomsen, NSÍ

**Útileikarar:**
Janus Joensen, HB
Jákup á Borg, HB
Kári Nielsen, HB
Tór-Ingar Akselsen, HB
Fróði Benjaminsen, B36
Atli Danielsen, KÍ
Ovi Nysted, KÍ
Heðin á Lakjuni, KÍ
Óli Hansen, NSÍ
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ
Marni Djurhuus, EB/Streymur
Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur
Mortan úr Hørg, VB
Símun Samuelsen, VB
Pauli Hansen, Skála
Jonhard Frederiksberg, Skála
Høgni Zachariassen, ÍF
Rógvi Jacobsen, Fram Ísland

Janus Joensen:

# – Errin av úttøkuni

**Ein av nýggjum monnunum í landsliðshópinum er verjuleikarin Janus M. Joensen úr HB. Hann gjørdist sera fegin, tá ið Sosialurin kundi bera honum tey tíðindi, at hann var úttikin til venjingarleguna í Spania**

LANDSLIÐSÚTTØKA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mikumorgunin fingu vit fatur á sterka vinstra bakkinum hjá HB seinnu árini, Janus M. Joensen, meðan hann var í skúla á Tekniska Skúla í Havn. Janus lærir til elektrikara hjá Leif Mohr, og í løtuni er hann á skúlabeinki.

### Vísa mínar dygdir

Janus sigur seg verða sera ernan av úttøkuni. - Hetta er ein stórur heiður, og nú má eg so royna at vísa landsliðsvenjaranum, hvør dugur er í mær, sigur Janus Joensen og leggur afturat, at vónandi kann eitt gott avrik frá hansara síðu á venjingarleguni verða við til, at hann fer at fáa landsliðsboð aftur seinni.

Á vanliga plássinum hjá Janusi, vinstra bakki, er Súni Olsen sjálvskrivaður á landsliðnum, men annars tykjast tað ikki verða so nógvir inni í myndini til at loysa av á tí plássinum. – Eg havi eisini varhugan av, at landsliðsvenjarin kanska hevur hug til at fáa Suna eitt sindur longur fram á vøllin, og tað kann møguliga geva pláss fyri mær, vónar Janus M. Joensen.

Einaferð áður hevur Janus verið við til landsliðsvenjing í Føroyum. Hetta var fyri trimum árum síðani, men tá var hann so mikið óheppin, at hann fekk ein so mikið álvarsligan skaða undir venjingini á landsliðnum, at hann ikki var førur fyri at spæla næstu fimm mánaðirnar.



*Sterki verjuleikarin hjá HB, Janus M. Joensen, var sera errin av at verða úttikin til føroyska landsliðshópin, sum í næstum fer til Spania á venjingarlegu.*

*mynd: Álvur Haraldsen*